# Fólk ilskast inn á sjónvarpsgjald


Samstundis sum fólk í høvuðsstaðnum hava mist fimm ókeypis kanalir, skulu tey gjalda meira í sjónvarpsgjaldi, og tað hóvar teimum lítið.

Mynd: Jens K. Vang

**Hyggjaragjaldið er hækkað við 500 krónum, men fólk vænta sær onki afturfyri, og tey kalla hækkingina ein duldan eykaskatt. Summi høvdu valt føroyska sjónvarpið frá, kundu tey, tí nógv fleiri pengar skulu á borðið nú, um fólk skulu hava eitt líkinda útboð av rásum**

HYGGJARAGJALD
*Ingi Rasmussen*

Svínarí. Ein grovur eyka skattur. Alt ov nógv.

Fólk á gøtuni, sum Sosialurin hevur tosað við, eru alt annað enn nøgd við hækkingina av sjónvarpsgjaldinum, sum Annlis Bjarkhamar landsstýriskvinna hevur kunngjørt.

Hyggjaragjaldið hækkar eftir einum degi úr 1500 upp í 2000 krónur komandi ár. Hetta hendir samstundis, sum sløkt er fyri Rás Tórshavn, har fólk í høvuðsstaðarøkinum fingu fimm eyka rásir umframt Sjónvarp Føroya fyri onki.

## Væl dýrari

Sløkt er fyri BBC Prime, BBC World, Eurosport, TV3 og MTV. Skulu fólk fáa somu líka fjølbroyttar sjónvarpsrásir sum áður, mugu sostatt nógv fleiri pengar á borðið.

Hyggjaragjaldið, ið er lógarkravt, verður sum nevnt 2000 krónur. Ein móttakari, sum er neyðugur fyri at móttaka Televarpið, kostar minst 2200 krónur. Biligasta árshaldið hjá Televarpinum kostar eisini umleið 2200 krónur. Og so skalt tú eisini gjalda fyri Útvarpið, sum kostar 1500 krónur um árið.

Við øðrum orðum skulu gjaldast knappar 8000 krónur fyri tað, sum áður kostaði 3000 krónur, tá Útvarp Føroya og móttakarin verða íroknað.

## Fólk í øðini

Hyggjarin er í øðini, kunnu vit róliga siga út frá teimum fólkum á havnargøtum, sum Sosialurin prátaði við mikudagin. Ongin av teimum umleið 10 fólkunum, vit fingu orðið á, helt at hækkingin var hóskandi ella í lagi, og onkustaðni var nærum uppreistrarhugur.

– Eg haldi ikki, at landsstýrið kann loyva sær hetta uttan víðari. Hvussu kunnu teir tosa um skattalækking, tá teir samstundis hækka hyggjaragjaldið? Hevði eg kunnað valt Sjónvarp Føroya frá, so hevði eg gjørt tað, men tað kann eg jú ikki, sigur 21 ára gamli arbeiðsmaðurin Rúni Vesturklett.

Hetta var niðurlagið. Landsstýrið lovar skattahækking við aðrari hondini, men skundar sær at taka teir innaftur við hinari.

## Økt krøv

Umleið 13.700 fólk rinda sjónvarpsgjald, sum er. Hækkingin skuldi givið sjónvarpinum góðar 5 milliónir krónur í meirinntøku, hóast tað kann hugsast, at hækkingin eisini ger tað truplari at fáa lógarkravda peningin til høldar.

Ein partur av peninginum skal brúkast til lønarhækkingar og rakstraríløgur, og sostatt fær hyggjarin altso ikki fullan valuta fyri pengarnar við einum betri føroyskum sjónvarpi.

Peningurin kemur á eitt turt stað og sleppur stjóranum undan at siga fólkum úr starvi, men hann ásannar í somu vending, at tað verður trupult at liva upp til krøvini, sum fylgja við. Men tað er ikki líkt til, at øll fólk vænta sær nakað aftur fyri meirkostnaðin.

– Sjónvarpið verður onki betri av hesum. Her verður bara tikið inn og onki latið afturfyri, og vit fáa onki gjørt við tað, sigur Hákun Jensen, 65 ár, og somu støðu høvdu hinir í Undirhúsinum í Vágsbotni.

## Endursenda tilfar

Hjá teimum, sum hava parabol frammanundan, verður tað ovmikið at síggja og gjalda í framtíðini.

– SvF er stórt sæð bara endursendingar frá øðrum útlendskum sjónvarpsrásum, og tí er tað eitt sindur meiningsleyst at gjalda so nógv, tá eg havi parabol frammanundan, sigur 23 ára gamla Majbritt Hellisdal, sum var úti og trillaði við nýføðinginum.

Líka lítið hjálpa mótmælini. Hyggjarin hevur onki val. Hann skal gjalda økta sjónvarpsgjaldið, tí tað er lógarásett. Men tað vóru eisini fleiri fólk í havnargøtum, sum søgdu seg umhugsa at lata vera kortini.

**Hvat heldur tú um, at sjónvarpsgjaldið hækkar úr 1500 til 2000 krónur?**



**Majbritt Hellisdal, 23 ár**

Tað er nógv at gjalda 2000 krónur fyri Sjónvarp Føroya – helst fyri gomul fólk, sum hava nógv at gjalda frammanundan.

Eg havi parabol, og hevði eg havt møguleika fyri tí, so hevði eg valt Sjónvarp Føroya frá. SvF er stórt sæð bara endursendingar frá øðrum útlendskum sjónvarpsrásum, og tí er tað eitt sindur meiningsleyst at gjalda so nógv, tá tú hevur parabol.

Tey siga, at skatturin hjá okkum skal niður, men hetta er ein hækking, so tað gongur út upp á eitt.

Tað verður saknur í Rás Tórshavn, tí har var nógv fyri tey ungu, bæði í TV3, MTV og Eurosport.



**Hákun Jensen, 65 ár**

2000 krónur er alt ov nógv. Sjónvarpið verður onki betri av hesum. Her verður bara tikið inn og onki latið afturfyri, og vit fáa onki gjørt við tað. Eg haldi at SvF skuldi dugað betur at savna sær pengar inn, líka sum ÚF hevur gjørt.

Tað er nógv fyri, at ein landsstýrismaður kann gera hetta av, uttan nakað kjak. Hetta skuldi verið diskuterað væl ígjøgnum fyrst. Hvat eru hesar útvarps- og sjónvarpsnevndirnar til, tá hetta bara verður trumlað ígjøgnum politiskt?

Eg haldi, at vit skuldu kunnað valt millum SvF og allar hinar rásirnar. Vit vistu, at Rás Tórshavn fór at sløkkja, men eg havi ikki avgjørt, um eg taki av tilboðnum hjá Televarpinum. Tað er spurningurin, hvussu nógv tú kanst gjalda fyri at síggja sjónvarp.



**Solveig Johansen, 70 ár**

Hetta líkist ongum. Prísurin verður bara settur upp, uttan at hyggjarin fær gjørt nakað við tað. Hetta er ein eyka skattarokning, sum vit fáa.

2000 krónur fyri sjónvarp er alt ov dýrt, tí vit skulu jú eisini gjalda fyri útvarp. Eg sakni eisini Rás Tórshavn, nú tað er tikið av skíggjanum.

Tað er beinleiðis svínarí, at Televarpið skal kappast móti okkara egna sjónvarpi. Tað skuldi heldur verið SvF, sum fekk hendan møguleikan at senda fylgissveinasjónvarp. Alt skuldi sjálvandi verið undir einum. So kundu pengarnir, sum komu inn, verið brúktir til at gjørt SvF betri.



**Rúni Vesturklett, 21 ár**

Hetta kunnu politikaranir ikki loyva sær at gera, tí hetta er alt ov nógv.

Sjónvarpið hevur alt ov lítið at bjóða uppá. So skjótt Televarpið rættiliga er komið í gongd, so fáa fólk alt frammanundan, tí meginparturin av sendingunum hjá SvF er sendur frammanundan í DR.

Hevði eg sloppið, so hevði eg valt SvF frá og heldur valt Televarpið. Eg brúki bara SvF til Dag og viku, og ov fáar sendingar eru á føroyskum.

Eg umhugsi at fáa mær mína egna parabol, men møguliga verður tað Televarpið. Eg haldi bara, at tað er ótrúliga dýrt, um tú skalt gjalda 2000 krónur fyri SvF, yvir 2000 krónur til eina boks og aðrar 2000 krónur fyri rásirnar.




MARKO ´02
SØLUSTEVNAN
Í Ítróttarhøllini í Runavík 7.- 8 desember 2002

Skrá:

Leygardagur 7. desember
kl. 14.00 Marko´02 letur upp
kl. 15.00 Býráðsformaðurin í Runavíkar Kommunu Rodmund Nielsen setur Marko´02
kl. 16.00 Fjotti og gandakallurin
kl. 17.00 Barnasangur við Dúritu, Sólvu, Beintu og Tanju
kl. 19.00 Mótasýning
kl. 20.00 Magni Christiansen syngur
kl. 21.50 Drigið verður millum tey seldu atgongumerkini, og høvuðsvinningin leygarkvøldið, ið er ein Apex ferðaseðil
kl. 22.00 Marko´02 letur aftur

Sunnudagur 8. desember
kl. 15.00 Marko´02 letur upp
kl. 16.30 Angela og Hannibal *
kl. 17.30 Mótasýning *
kl. 19.00 Jens Marni og Kim Hansen syngja
kl. 20.00 Mótasýning
kl. 21.30 Drigið verður millum tey seldu atgongumerkini, og høvusðvinningin sunnukvøldið, ið er eitt widescreen sjónvarp, her verður drigið millum seld atgongumerkir báðar dagarnar.
kl. 21.45 Marko´02 letur aftur

* Broyting frá áðurlýstu skrá



Luttakarar:

1. Oliwind
2. Teting
3. Flogfelag Føroya
4. Kall
5. Hjá Annfinni
6. KBI
7. Vello
8. AWJ
9. Opus
10. Máling og Gólv
11. Flísan
12. Snøldan
13. Tupperware
14. El-tænastan
15. NSÍ
16. Frú S.
17. Shop In
18. Flex Bygg
19. Gastrolux
20. Skóselan
21. Hansen
22. Fandango
23. Fandango
24. PAU
25. El & Tele
26. Drós
27. Diva
28. Marjun Heimá
29. Simi
30. Pallur
31. Matstova




